# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Vakstrarpakkin má ikki gerast hvørvisjón

Hósdagin legði Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum, fram ein vakstrarpakka við átøkum og tilmælum um, hvussu ymsar vinnugreinar kunnu stimbrast.

Talan er um oman fyri 20 átøk innan 16 ymisk øki, sum ætlanin er at seta í verk fyri at bøta um støðuna hjá verandi og nýggjum vinnum og harvið skapa vøkstur og tryggja arbeiðspláss, bæði upp á stutt og upp á longri sikt, sigur Vinnumálaráðið.

Átøkini eru grudnað á eitt tætt samskifti við felagsskapir, virki og fólk úr vinnuni, sum eru biðin um at leggja fram síni uppskot, og eisini at ummæla lidnu ætlanina.

Á síðu 10 í blaðnum í dag umrøða vit tvey av hesum átøkum. Tað fyrra er um støðuna hjá matstovuvinnuni, sum hevur havt sera trongar karmar. Matstovuvinnan er ein nýggj vinna í Føroyum, skilt á tann hátt, at broytingarnar í rúsdrekkalógini í 1992 broyttu fortreytirnar, sum framman undan vóru ein forðing fyri vakstrarmøguleikum í vinnuni.

Tað er helst eitt skilagott átak at taka burtur MVG fyri sølu av mati í hesi vinnuni. Eitt fyrivarni verður tó tikið, tí ES ásetir fimm prosent sum minstamark. Men hesum sleppa vit kanska undan í fyrstu syftu – og greiðari er tað helst, at vit bara hava tveir møguleikar fyri MVG, 25% ella 0%.

Vinnumálaráðið tekur sum givið, at ongar broytingar verða gjørdar í rúsdrekkalógini til tess at bøta um inntøkumøguleikarnar í matstovuvinnuni. Tað er helst ikki rætt at útilokað hendan møguleikan beinanvegin, tí her áttu eisini broytingar at kunna verið gjørdar – uttan at broyta endamálið við rúsdrekkapolitikkinum fyri tað. Men um myndugleikarnir megna at taka burtur MVG'ið, so man hendan vinnan skjótt fara at merkja vøkstur.

Vit kunnu so bert vóna, at vakstrarpakkanum verður lív lagað – so hann ikki endar sum ein hvørvisjón eins og Visjón 2015…

**Sosialurin**

## Ognir eiga at fylgja limunum og ikki nevndunum

**AKSEL V. JOHANNESEN**
landsstýrismaður í heilsumálum



Nýggja samhaldsfasta sjúkatryggingin – Heilutrygd – fer at seta eina heilt nýggja tilskotsskipan í verk. Tey, sum hava mest brúkt fyri tilskoti til heilivág, verða tey, sum fáa mest afturgoldið.

At tey, sum noyðast at brúka mest heilivág, eisini eru tey, sum fáa mest afturgoldið fer væntandi at minkað um tørvin á eini privatari sjúkratrygging við síðuna av. Nýggja skipanin hjá Heilsutrygd rakar so breitt og stuðlar so mikið málrættað, at øll skuldu verið væl vard av Heilsutrygd.

Meginfelag Sjúkrakassa førir fram, at nú sjúkrakassarnir vera niðurlagdir, so verða ognirnar hjá sjúkrakassunum best brúktar at stovna eina privata ískoytistrygging at leggja omaná tryggingina frá Heilsutrygd.

Í løtuni er ringt at síggja, at tað skuldi verið neyðugt við einari privatari sjúkratrygging við síðuna av Heilsutrygd.

Í øllum førum verður Heilsutrygd í framtíðini álitið hjá øllum føroyingum.

Tí er trupult at skilja, hví ognirnar hjá øllum føroyingum, sum enn eru limir í sjúkrakassunum, skulu brúkast til at stovna eina privata sjúkratrygging fyri nøkur fá.

Tá sjúkrakassarnir verða tiknir av 1. januar flyta allir limirnir yvir í Heilsutrygd. Tí er tað okkara fatan, at ognirnar eiga at fylgja limunum og ikki vera eftir hjá eini nýggjari nevnd, sum skal virka undir tryggingarlógini og sum skal út at leita eftir nýggjum limum til eina privata trygging.

Okkara løgfrøðingur er komin til, at ognirnar í sjúkrakassunum skulu har, sum limirnir eru og harvið koma øllum til góðar.

Eg kundi skilt, um Meginfelag Sjúkrakassa stúrdi fyri, at ognirnar hjá sjúkrakassunum verða oystar inn í raksturin á einum nýggjum almennum stovni.

Men tað hevur ongantíð verið ætlanin. Fylgja ognirnar við limunum yvir í Heilsutrygd, skjóti eg upp, at vit stovna ein Heilsugrunn, sum skal stuðla ymsum átøkum, ið koma limunum til góðar. Tað veri seg gransking, fyribyrgjandi arbeiði, til útbúgving av fleiri kommunulæknum o.l.

Tað er eisini rímiligt, at umboð fyri sjúkrakassarnar verða við at stýra einum nýggjum Heilsugrunni.

Heilsutrygd fer til 1. januar 2012 at virka sum ein sjúkrakassi, har øll gjalda saman gjald – 245 krónur um mánaðin. Men í lógini verður eisini staðfest, at 1. januar 2012 verður gjaldið tikið av, og Heilsutrygd skal fíggjast umvegis skattaskipanina.

At enda vil eg eisini gera greitt, at Heilsutrygd verður bíligari at reka enn verandi sjúkrakassar. Sambært roknskapinum hjá sjúkrakassunum fyri 2008 kostaðu teir níggju milliónir krónur um árið. Heilsutrygd fer í mesta lagi at kosta seks milliónir krónur. Ongi óneyðug ráð ella stýri verða í nýggja bygnaðinum, sum summi hava ført fram. Tvørturímóti verður talan um eina stovn uttan nakran eykakostnað í umsitingini.

## Viðmerking til tíðindaskriv frá Meginfelag Sjúkrakassa Føroya

**LUITJEN APOL**

Limur nr. 22747

Síðani eg gjørdist 16 ára gamal havi eg verið limur í einum »felag«. Tað óvanliga við hesum limaskapi er tó, at eg ikki gjørdist limur av fríum vilja, men varð tvungin uppí.

Havi roknað meg fram til at hava goldið hesum »felag« uml. 100 túsund krónur í limagjaldi higartil.

Hvussu nógvan ágóða eg havi fingið afturfyri veit eg ikki, men tað man helst verða niðan fyri 10 túsund krónur.

Havi tó goldið gleðiliga øll hesi árini, tí onnur enn eg sjálvur helst hava fyrimun av hesum samhaldsfasta limaskapi.

Mítt »felag« hevur gjøgnum árini savnað saman uml. 40 mill. krónur. Og nú ætlar landsstýrismaðurin sær at taka hesar pengarnar frá mínum »felag« at seta í eitt annað »felag«, har eisini øll skulu verða limir.

Í tíðindaskrivinum siga tit: »at allir limir í sjúkrakassanum hava fullan rætt til at varðveita sín limaskap í sjúkrakassanum, tá hesir eftir ætlan skulu halda áfram á privatrættarligum grundarlagi«.

Tit siga, at tit ætla at brúka m.a. mínar pengar til at seta á stovn ein privatan sjúkrakassa, sum eg tíverri ikki havi ráð til at verða limur í, tí nú verði eg noyddur at rinda til nýggja »felagið« hjá landsstýrismanninum.

Við øðrum orðum fáa tit bert limir, sum fíggjarliga eru soleiðis fyri, at hesi hava ráð at rinda til bæði »feløgini«.

Hvat viðvíkur ognarrættin til hesar 40 mill. siga tit: »at tað beinleiðis stendur í lógini, at ognirnar hjá sjúkrakassanum **ongantíð** kunnu býtast út millum limir felagsins!«

Men tit siga einki um, hvat teir annars skulu nýtast til uttan at teir skulu brúkast til stovnsfæ til nýggja privata sjúkrakassan! (40 mill. til stovnan- og nevndarlimir?)

Tað løgna í øllum hesum málinum er, at Meginfelagið hevur í nøkur ár vita av ætlanini at stovna almennu heilsutrygdina fyri allar landsins borgarar, nústaðni ger vart við seg.

**Eg mótmæli, at mínar inngjaldingar í meira enn 40 ár nú møguliga verða brúktar til at stovnseta ein privatan sjúkrakassa, sum eg ikki havi ráð til eisini at verða limur í!**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.